# Okkurt høvd má rúka

**Antin mugu høvd á embætifólki rúka, ella má Annlis Bjarkhamar rúka, heldur Tórbjørn Jacobsen, fyrrverandi landsstýrismaður í mentamálum**

LANDSANTIKVARUR
*Áki Bertholdsen*



*–Tað tykist ikki sum um at tað sama er galdandi fyri Annlis Bjarkhamar, sum fyri Signar á Brúnni, Jørgen Niclasen og meg sjálvan, sigur Tórbjørn Jacobsen, ið sjálvur varð feldur sum landsstýrismaður í mentamálum*

– Tað verður neyðugt at fáa fulla greiði á málinum um landsantikvarin.

Tórbjørn Jacobsen, løgtings- og fólkatingsmaður, og fyrrverandi landsstyrismaður í mentamálum, heldur, at einasta loysnin nú er, at Løgtingsins umboðsmaður kannar málið um setanina av landsantikvari til botns.

– Hetta málið er nú so fløkt, og tað er so nógv sagt og gitt av so mongum ymiskum, at einasta óhefti stovnur, sum kann gera nakað vid málið, er Løgtingsins Umboðsmadur, sigur Tórbjørn Jacobsen

Og tað heldur hann avgjørt eigur at verda gjørt.

– Hetta málið kann vísa seg at verða ein gøla, annaðhvørt fyri landsstýrismannin og sostatt tjóðveldisflokkin, ella fyri embætisverkið í mentamálaráðnum.

Men er tad ein gøla, eigur tað at koma fram og so eiga neyðug stig at verða tikin. Antin eiga embætisfólk í Mentamálaráðnum at taka avleiðingarnar av einum vánaligum arbeiði í sambandi vid innstillingarnar til starvið.

– Men verður niðurstøðan hjá Umboðsmanninum, at Annlis Bjarkhamar hevur gjørt álvarslig mistøk, eigur hon at rúka, sigur fyrrverandi landsstýrismaðurin.

Annlis Bjarkhamar er fjórði landsstýrismaðurin í mentamálum hjá tjóðveldisflokkinum hesi seinastu fimm árini.

Men Tórbjørn Jacobsen dugir ikki at siga, hví tað gongst so illa hjá tjóðveldisfólki at støðast í Mentamálaráðnum.

– Eg veit ikki um tað er nakað galið við landsstyrisfólkunum, ella um tað er nakað galið við embætisverkinum. Men eg kann bara siga, at tað hevði onki við embætisverkið at gera, at eg gjørdi av at fara frá sum landsstýrismaður í sínari tíð.

– Tað varð gjørt út frá míni egnu politisku meting av støðuni, sum tá var íkomin og sum eg metti kundi verða til skaða fyri flokkin og fullveldissakina frameftir.

– Men eitt heilt annað er, hvussu liviligt tað verður hjá Annlis Bjarkhamar í Mentamálaráðnum eftir tað, sum er sagt og skrivað um embætisverkið í sambandi vid landsantikvarin.

– Tað er eisini ein spurningur um, hvussu liviligt tað verður hjá Steffen Stumman Hansen á Fornminnissavninum, nú næstan alt starvsfólkið á stovninum hevur tikið greiða støðu til frama fyri Símun Arge.

## Mangt undarligt

Annars heldur Tórbjørn Jacobsen, at mangt undarligt er farið fram í sambandi við landsantikvarin.

– Er tað so, at Símun Arge er vrakaður til frama fyri ein dana, sum er verri skikkaður, er tað onki minni enn ein gøla, bæði fyri tjóðveldisflokkin, fyri fornminnissavnið og fyri almennu skipanina yvirhøvur.

Hjá setanarnevndini var ongin ivi um, at Símun Arge varð best skikkaður til starvið og landsstyriskvinnan eigur at hava ómetaliga góðar orsøkir til at skúgva tað tilmælið til viks.

Annars heldur Tórbjørn Jacobsen lítið um tað, at bæði aðalstjórin og stjórin á mentanardeildini hava verið í setanarnevndini.

– Hvaðani skuldi landsstyrismaðurin fáa sína ráðgeving frá, eftir at innstillingin var gjørd, tá ið bæði fyrsti og annar styrimaður lógu niðurbundnir í málinum? spyr hann.

Tað hevur ikki verið siðvenja at spyrja messudreingirnar um ráð í truplum støðum.

– Tí er tað hugsandi at skiparin hevur søkt sær ráð uttanhysis, og tá er mest hugsandi at tey hvørki hava verið saklig ella faklig.

– Kunnu enntá hava verið partapolitisk, og tá er heilt illa statt.

Torbjørn Jacobsen heldur annars, at vit eiga at hugsa okkum sera væl um, áðrenn vit seta ein útlending at umsita tann partin av okkara sál, sum eitur okkara fornminni.

– Eg ivist stórliga í, um danir høvdu funnið uppá at sett ein turkara ella ein somaliara í starv sum danskan landsantikvar, tí hvørjar kenslur skuldu teir havt fyri donskum fornminnum?

– Og hvat verður tað næsta: Verður næsti leiðarin á Føroyamálsdeildini kanska grønlendingur, spyr Tórbjørn Jacobsen.

## Lítið klokari

Hann sigur, at hvørki hann, ella almenningurin annars, hava nakrar fyritreytir fyri at meta um málið og tí eigur umboðsmaðurin at kanna tad til botns.

– Tað einasta, vit hava at halda okkum til, eru tær leysasøgur og alt tað viðvarðandi túnatosið sum gongur ímillum manna, tí tað, sum er sagt og skrivað, verður ongin stórt klókari av.

Men hann heldur at tað er undrunarvert, so stóran áhuga summir bólkar í samfelagnum hava fyri hesum málinum, framum onnur mál, sum hava verið frammi og sum hesir somu bólkar als ikki hava givið gætur. Hann vil ikki útgreina hetta nærri, men í oddagrein í seinastu Fregnum nevnir hann fólk kring granskingardepilin fyri Økismenning í Klaksvík og tað sum viðhvørt verður nevnt »Ruc-mafian« ímillum manna.

– Er tad so galið, at at tað eru ávísir bólkar í samfelagnum sum leggja trýst á skipanina, og sum hava ein serligan áhuga í, at Steffen Stumman Hansen fær starvið? spyr Tórbjørn Jacobsen. Men, hvat skuldi hesin áhugin verið, tí fyribils er ikki lætt at fáa eyga á samanhangin ímillum starvið sum landsantikvarur og ávísar »action-directe« ella politiskar kommandobólkar í Føroyum, sum hann malber seg.

## Tjóðveldisflokkurin tigandi

Hann spyr eisini, hvussu tad ber til, at leiðslan í tjóðveldisflokkinum er so tigandi.

– Tjóðveldisflokkurin hevur verið rættiliga avgjørdur í øðrum málum um embætisførsluna hjá landsstýrismonnum og um reinføri hjá politikarum, eisini hjá tjóðveldisflokkinum sjálvum.

– Bara at ivi var sáddur um eina embætisførslu, skuldi tad vera nóg mikið til at fella ein landsstyrismann.

– Men nú tykist tað sum um støðan er broytt og tað er hugvekjandi, at tjóðveldisflokkurin ikki er farin fram vid sama fastleika í hesum máli sum í øðrum, líknandi málum.

– Men enn er so ongin almenn viðmerking komin frá flokkinum og tad kann fáa fólk at spyrja um ikki tað sama er galdandi fyri Annlis Bjarkhamar, sum var galdandi fyri Signar á Brúnni, Jørgen Niclasen og meg sjálvan, heldur Tórbjørn Jacobsen.

Hann sigur, at hann tók sjálvur sum tingmadur, í sínari tíd, stig til at fáa málið hjá Jørgen Niclasen kannað, tá álvarsamur illgruni var um hansara embætisførslu. Tad málið var kannað, og tað vísti seg, at illgrunin var grundadur. Jørgen var farin útum heimildirnar. Tí mátti hann fara frá. Tað var bæði neyðugt og rætt.

– Enn veit eingin, um illgrunin um Annlis er grundaður. Men tað haldi eg skal kannast.

– Umboðsmaðurin má fara ígjøgnum alt málið. Verður niðurstøðan at hon hevur traðkað álvarsliga við síðuna av, má hon, eins og Jørgen Niclasen mynstra av landsstyrisskútuni,sigur Tórbjørn Jacobsen.

# Tórshavnar Býráð kallar Maritu Petersen upp

**Einasta kvinna, sum hevur verið løgmaður, fær nú ein veg nevndan eftir eftir sær**

Á fundi í annaðkvøld fer Tórshavnar Býráð at taka støðu til, antin ein vegur uppi við Løgmannabreyt skal kallast upp eftir Maritu Petersen, fyrrverandi Løgmanni.

Talan er um vegin í nýggju útstykkingini hjá Guttesen og Staksberg uppi við Løgmannabreyt.

Gøtunavnanevndin hjá býráðnum hevur skotið upp at nevna vegin Maritugøtu eftir Maritu Petersen, sála og hesum hevur mentamálanevndin hjá býráðnum tikið undir við.

Allar gøtur uppi við Løgmannabreyt, hava nøvn eftir løgmonnum, har eru Hákunargøta, Andrasargøta, Pætursgøta og Kristiansgøta og nú kemur so Maritugøta afturat.

Marita Petersen var løgmaður fyri javnaðarflokkin í 1993 og 1994 og hon var fyrsta kvinna, sum var løgmaður í Føroyum.

Hon doyði 26. august 2001, 60 ára gomul.



*Hetta er vegurin uppi við Løgmanabreyt, sum nú fær navn eftir Maritu petersen*



# Misnøgd við umboðsnevndarfundin

**Tað vóru fleiri umboðsnevndarlimir hjá SEV, sum sótu innibrendir við spurningum til stjóran og stýrið, tá hesi vórðu víst av fundinum mánadagin**

SEV-FUNDUR
*Edvard Joensen*



*Umboðsnevndarformaðurin fyrireikar fundirnar hjá nevndini og hevur í tí sambandi rætt til at fáa sær tað tilfar, hann heldur seg hava brúk fyri. Eisini eini løgfrøðingakanning, sigur Hans Tausen Olsen, umboðsnevndarformaður*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað varð ikki alt rætt artborið á umboðsnevndarfundinum hjá SEV á Hotel Hafnia mánadagin, sigur Regin á Lofti, umboðsnevndarlimur. Serliga var tað atburðin, tá stýrið og stjórin vórðu víst av fundinum, hann ikki er nøgdur við.

Regin á Lofti heldur ikki, at tað var rætt, at stýrið og stjórin vórðu send av fundinum, tí tað gjørdi, at har manglaði rættiliga nógv í, tá fundurin varð hildin.

Hann sigur, at hann sjálvur og aðrir umboðsnevndarlimir við honum, høvdu fyrireikað seg til fundin við millum øðrum spurningum til júst stjóran og stýrið. Spurningar um tey aktuellu málini, sum hava verið frammi um eitt nú embætisførsluna hjá stjóranum. Men av tí, at hvørki Klæmint Weihe, stjóri, ella stýrið, sluppu at vera á fundinum, sótu hesir, sum høvdu spurningar til teirra, innibrendir við teimum.

– Stjóri og stýri sluppu ikki at vera á fundinum, tí tað hava teir stutt og greitt ikki loyvi til, sigur umboðsnevndarformaðurin, Hans Tausen Olsen. Umboðsnevndarfundur er bara fyri umboðsnevndina. Skrivstovustjórin slapp at vera á fundi sum skrivari hjá nevndini. Men øll onnur skulu fara av fundinum.

## Formaðurin tekur sær vald

Regin á Lofti ivast í, um tað er rætt, at umboðsnevndin er hægsta vald í SEV. Hann heldur, ikki minst við fundinum mánadagin í huga, at umboðsnevndarformaðurin er við at gerast ein ov máttmikil persónur í felagsskapinum. Hann setir umboðsnevndina til viks, heldur Regin á Lofti, umboðsnevndarlimur.

Aftur vísir hann til, at tað kom áheitan frá einum umboðsnevndarlimi um at atkvøða um, hvørt stýrið og stjórin skuldu verða verandi á fundi. Men formaðurin vísti tí aftur við, at teir vóru longu farnir. Aftan á kundi so atkvøðast um teir skuldu koma innaftur. Og tann atkvøðugreiðlsan gav so tríggjar atkvøður í meiriluta til teirra, sum vildu hava stýrið og stjóran uttanfyri.

– Eg haldi, at tað var púra burturvið, at vit skuldu sita har og viðgera bæði stjórn og stýri soleiðis, uttan at fáa møguleika at spyrja tey um teirra viðmerkingar. Eg meini so við. Hevur tú dripið ein mann, sleppur tú rættin VIÐ sakførara at verja teg. Men hesir sluppu ikki. Og heldur ikki nakar sakførari, sigur Regin á Lofti.

Hans Tausen Olsen sigur, at tað var púra eftir forskriftunum, at stýri og stjóri vórðu biðin um at fara av fundi.

Hann hevur kannað mannagongdina hjá løgfrøðingum, og eingin hevur enn sagt honum annað enn, at tann framferðarháttur, nýttur varð mánadagin, var rættur, sigur umboðsnevndarformaðurin.

At stýri og stjórn ikki sluppu at verja seg, heldur hann heldur ikki vera rætt.

– Eg sendi teimum fimm brøv, har eg bað teir koma við sínum viðmerkingum. Stýrisformaðurin sendi umboðsnevdarlimunum eina frágreiðing, meðan stjórin sendi fýra síður, sum viðgjørdu mín persón. Tað fingu limirnir hósdagin, sum fundurin var aftur mánadag, so eg fekk ikki tíð at gera viðmerkingar til tað, sigur Hans Tausen Olsen.

## Løgfrøðinga-kanningin

Eitt, sum hevur verið nógv frammi í málinum og embætisførsluna hjá SEV stjóranum, er tann løgfrøðingafrágreiðingin, sum gjørd er um embætisførsluna hjá Klæminti Weihe.

– Sagt hevur verið, sigur Regin á Lofti, umboðsnevndarlimur, at umboðsnevndin hevur biðið um hana. Men eg veit einki um, at nevndin hevur verið kallað saman til at taka støðu til eina slíka umbøn. Eg meini, at tað er formaðurin sjálvur, sum av sínum eintingum hevur biðið um hesa frágreiðingina. Og tað kann væl samanberast við, at Klæmint Weihe keypir vørur upp á nakkan á SEV uttan at siga leiðsluni frá. Tað hevur hann fingið átalu fyri, og eg haldi ikki, at umboðsnevndarformaðurin eigur at sleppa púra uttan eina slíka heldur, vísir umboðsnevndarlimurin á.

Til tað sigur Hans Tausen Olsen, umboðsnevndarformaður, at tað er rætt, at hann einsamallur hevur biðið um frágreiðingina, men hevur sett umboðsnevndina fyri hana.

– Tað havi eg rætt til sambært fyrisitingarlógini, sigur hann. Eg havi kannað málið gjølla við løgfrøðiligari ráðgeving, og tað er eingin ivi um, at har er rætt atborið.

– Eg skal sum formaður fyri umboðsnevndini fyrireika fundirnar hjá nevndini, og tað havi eg gjørt við hasi kanningini. Hon kuldi til fyri at lýsa málið, sum viðgjørt varð á fundinum. Tann parturin, sum viðgjørdur varð, fekk eisini møguleikan, sigur Hans Tausen Olsen, umboðsnevndarformaður.

# Misálitið var bara til stýrið

**Uppskotið um misálit, sum lagt varð fyri umboðsnevndarfundin hjá SEV mánadagin, var bara til stýrið og ikki til stjóran**

SEV-FUNDUR
*Edvard Joensen*



*Tað var einki misálitisuppskot sett fram móti Klæminti Weihe, stjóra á SEV, men móti stýrinum. Hinvegin vað samtykt við hoyring at kanna embætisførsluna hjá stjóranum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tá uppskot varð lagt fyri umboðsnevndarfundin hjá SEV mánadagin, var tað bara ætlað stýrinum. Stýrið fekk eisini eina átalu. Samtykt varð at seta í verk eina hoyring av stjóranum.

Klæmint Weihe, stjóri á SEV, sigur við Sosialin, at tað, sum borið varð fram mikudagin eftir upplýsingum frá einum umboðsnevndarumboði, er ikki heilt rætt. Hann skal bara hoyrast í málinum, men fekk onga ávarðing ella átalu.

Hans Tausen Olsen, umboðsnevndarformaður váttar, at so er. Tað var stýrið, sum hóraði undan misálitsuppskotinum, men fekk eina greiða átalu, sum varð samtykt við 58 atkvøðum fyri og 13 ímóti, sigur hann.

Fyri hoyringini hjá stjóranum atkvøddu 38 umboðsnevndarlimir, men 30 hildu ikki, at tað var neyðugt at kanna embætisførslu hansara við eini hoyring.

Klæmint Weihe, stjóri, sigur, at enn hevur hann einki formliga fingið at vita frá fundinum mánadagin annað enn, at hann heldur fram sum stjóri í SEV.

At ein hoyring skal setast í verk, er eftir setanartreytunum hjá SEV stjóranum, sigur Klæmint Weihe. Hann er settur í starv eftir somu treytum, sum tænastumenn hjá tí almenna. Tó er hann ikki tænastumaður, tí SEV ikki er almennur stovnur, men stjórin er tó umfataður av teimum skyldum og rættindum, sum tænastumannalógin ásetir.

Tann horyngin, har hann so skal bera sína søk fram, skal vera klár til næsta umboðsnevndarfund, sum verður í mei.

Tá fer so at vísa seg, hvat víðari hendir, Um stjórin sleppur heilt undan víðari viðgerð. Um hann kanska fær eina ávaring, ella kanska okkurt heilt annað.

Klæmint Weihe, sigur, at hann fer ikki at gera nakað meira burtur úr hesum málinum, sum so mikið hóvasták hevur verið av.

– Eg havi lært av hesum málinum, at eg átti at tikið gegnisspurningin meira álvarsliga og hildið meg frá onkrum viðgerðum. Men tað er farið, og eg veit so til eina aðruferð, um tað skuldi borið so á, hvussu eg ikki skal gera, sigur hann.

Hann heldur, at tða kann fara at gerast trupult at manna týðandi nevndir í Føroyum við teimum viðurskiftum, vit hava her, uttan at onkur fer at renna seg í móti einum gegnistrupulleika av og á.

– Úrvalið er ikki so stórt, og øll kenna onkran, sum kemur fyri mestsum allastaðni, vísir Klæmint Weihe á. Men eg fari at hugsa meg væl um, verður tað í framtíðini heitt á meg um at átaka mær slíkar nevndarsessir sum eitt nú tann í partafelagnum Vágatunlinum.